gult cyan magenta svart

Føroya Keypssamtøka

LEYST STARV

Varaleiðari til handilin í Dr. Jakobsensgøtu

At seta skjótast til ber ella eftir eftir nærri avtalu.

Uppgávurnar eru:
- **at** halda handilin á einum høgum støði
- **at** hava dagligu ábyrgdina av einum nøktandi handli hjá viðskiftafólkunum
- **at** vera avloysari hjá deildarleiðaranum

Eisini er møguleiki fyri:
- framtíðaravbjóðingum
- at royna evnir og hugflog í einum spennandi umhvørvi

Løn sambært avtalu.

Áhugað kunnu venda sær til Bo Møller Hansen, deildarleiðara, tlf. 281721.

Skrivlig umsókn skal sendast til **FK Dr. Jakobsensgøtu, boks 349, 110 Tórshavn**, att. Bo M. Hansen í seinasta lagi 16. august 2000.

Keypssamtøkan
í Dr. Jakobsensgøtu

Runavíkar Skúlanevnd

Til komandi skúlaár verður søkt eftir einum lærara til eitt fyribilsstarv/tíðaravmarkað starv.

Í tímatalvuni, sum hevur 21 undirvísingartímar, er millum annað:
Hondarbeiði við 5. flokki,
Ítróttur við 8. flokki og
Heimkunnleiki við 6. flokki

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokkunum 18.1 til 27.4

Fleiri upplýsingar fáast við at ringja til 449975.

Møguligar umsóknir skulu vera skúlanevndini í hendi í seinasta lagi 15. august 2000 og skulu sendast til

Runavíkar Skúlanevnd
v/ Malan Rasmussen, tlf. 441842
FO-660 Søldarfjørður

Trukkar, stáblarar og BT lyftivognar til tygara tørv!

Vit útvega EXIDE battaríir, løðitól til **øll merkir** av trukkum og stáblarum

Tosið við okkum!

Kaj Andreasen & Co
Sandvíkarhjalli - Tel. 315600 - Fax 318008

Føroya Keypssamtøka

Fólk søkist til grønmetisdeildina

at byrja 1. september ella eftir nærri avtalu.

Vit vænta av tær
- **at** tú hevur hollan kunnleika til frukt og grønmeti frá núverandi ella fyrrverandi arbeiði
- **at** tú hevur eyga fyri dygd og búskapi
- **at** tú ert kreativur og virkin, og kann vísa fram eina fyrstafloks deild, sum er tann besta í býnum

Vit kunnu bjóða tær
- **eitt** sjálvstøðugt og mennandi arbeiði
- **eitt** gott arbeiðsumhvørvi

Áhugað kunnu venda sær til Bo Møller Hansen, deildarleiðara, tlf. 281721.

Skrivlig umsókn skal sendast til **FK Dr. Jakobsensgøtu, boks 349, 110 Tórshavn**, att. Bo M. Hansen í seinasta lagi 16. august 2000.

Keypssamtøkan
í Dr. Jakobsensgøtu

V&B

Fráboðan um seismikkvirksemi

Lýst verður at seismiskar kanningar verða gjørdar á hesari havleið:

60^{0}05'N og 004^{0}43'V; 60^{0}28'5N og 005^{0}28'V
60^{0}47'N og 004^{0}49'V; 60^{0}23'5N og 004^{0}03'V

Felagið BP Exploration stendur fyri kanningunum.

Byrjað verður 10.08.2000
Arbeiðið tekur væntandi .... 1 mánaða
Skipanavn .... Svitzer Meridian
Kallibókst./
Heimstaður ..... C6QR4, Nassau Bahamas
Kaðallongd .... 1200 metrar
Fiskiveiðiumboð .... Magni Skaale

Samband fæst við skipið á VHF rás 16.

Upplýsingar um dagligar seismiskar fráboðanir og ávaringar fáast á sjálvvirkandi telefonskipanini 32 03 41, ella á telefon 31 10 65.

DANNY TRANSPORT

- tá okkurt skal koyrast ella goymast

Tlf. 319192

Veri-Con Pf.

Ráðg. verkfrøðingar
søkir eftir
El-verkfrøðingi/installatøri
og
Tekniskum assistenti/teknara
at byrja í starvi 15. september 2000

Arbeiðið vil umfata projektering av tekniskum installatiónum vm.

Viðkomandi umsøkjarar skulu kunna arbeiða sjálvstøðugt umframt hava fakligan førleika innan nevnda yrki.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi skjótast møguligt og í seinasta lagi 31. august 2000.

Veri-Con Pf
Ráðgevandi verkfrøðingar
Lucas Debesar Gøta 9 · 100 Tórshavn
Tlf. 31 89 20 · Fax 31 89 25
Teldupost adressa: veri_con@post.olivant.fo

Summarfrí

Vegna summarfrí er verkstaður okkara stongdur til 4. september.

NIELS L. ARGE
HANDMADE JEWELLERY
ESTABLISHED 1932
Kongabrúgvin • Tel. 311731 • Fax 318532

Hús í Þorkeri til sølu

Hús við úthúsi á Miðgerði í Þorkeri til sølu.

Áhugað kunnu ringja

Tlf. 0045 96 78 30 55 ella **tlf. 44 71 96**

Arbeiði

Hevur tú hug at hjálpa til í nýggja køkinum í Club 20?

Í samband við at vit hava opna nýggja café í neðra sóknast vit eftir 2 hjálparfólkum til køk okkara.

Ikki er neyðugt við útbúgving. Ein treyt er tó at tú ert fylt/ur 18 ár.

Um hettar hevur tín áhuga so vinarliga ringið og tosið við Jeanette á tlf.:

216804 áðrenn kl. 17.00
315628 eftir kl. 17.00

Discoteque Club 20

Ítróttur

e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

Lesi› eisini ÍtróttaSosialin á alnetinum:
www.sosialurin.fo

Regin rakk finalusessi

Føroya sterkasti ma›ur skúgva›i sterkastu menninar úr Onglandi og USA til viks, og fer hesa vikuna at kappast í finaluni um at gerast heimsins sterkasti

JÁKUP MØRK

Innlei›andi bólkurin, sum Regin var í, mundi vera hin torførasti av øllum, og hetta gjørdi sjálvsagt ikki gle›ina hjá Regini minni

Endiliga eydna›ist ta› aftur hjá Regini! Í fleiri kappingum, sum sterkasti føroyingurin hevur roynt seg í, hevur eydnan vent eyguni onkran annan veg, men sunnudagin smíltist hon aftur til Regin.

Javnir í stigum

Ta› stó› annars nógv á, tá seinasta kappingin í innlei›andi bólkinum stó› á skránni sunnudagin. Regin hev›i annars vunni› sær eina gó›a stø›u undan sunnudegnum, men í fyrru av teimum bá›um kappingunum, sum tá vóru á skránni gekk heilt gali›.

Talan var um eina kapping, har nakrir veldugir pelar skuldu koppast eftir enda, og orsaka› av einum vøddaska›a formáddi Regin sær so at siga einki í hesi kappingini, har hann gjørdist aftast. Sostatt var bert eitt stig á muni millum teir bá›ar undan seinastu kappingini. Her ráddi um at lyfta fimm steinar upp á tunnur so skjótt sum gjørligt.

Regin er vanliga sera sterkur í hesi kappingargrein, og hann var eisini skjótastur av øllum luttakarunum at lyfta teir fyrstu f‡ra. Fimta steinin megna›i hann tó ikki at lyfta, men tá ta› kom til stykkis, so kosta›i hetta tó ikki naka›.

Onglendingurin, sum megna›i at lyfta fimta steinin, hev›i nevnliga ringastu tí›ina av teimum, sum lyftu allar, og tí fekk hann bert eitt stig meira enn Regin fyri kappingina. Sostatt enda›u teir javnir í stigum, men tá Regin hev›i fleiri topp plaseringar at vísa á, eydna›ist ta› honum at koma í finalubólkin.

Lagar seg

Tá vit tosa›u vi› Regin sunnukvøldi›, hev›i hann júst fingi› vi›ger› fyri ska›an, sum hann hevur fingi› í kappingini. Talan er um eitt vøddafesti ovarlaga á bringuni, sum mest sum er loysna› frá einum rivi.

Tá so er, kann talan ofta gerast um drúgvar ska›ar, men Regin rokna›i kortini vi›, at hetta fór at laga seg, solei›is at hann kann vera so nøkunlunda fyri, tá byrja› ver›ur aftur mikudagin.

Regin hevur ikki sjálvur nakran vøddam‡kjara ella líknandi vi› á fer›ini, men hann grei›ir frá, at bæ›i læknar og anna› gott fólk er tøkt hjá luttakarunum, og at hesir duga síni ting er føroyingurin als ikki í iva um.

Fram til mikudagin fær Regin vi›ger› fyri ska›an, og so er bara at vóna, at alt er komi› í rættlag til ta tí›

Annars er rættuliga vanligt, at ska›ar av ymsum slag stinga seg upp, tá kappast ver›ur millum sterku menninar. Nógv ver›ur lagt fyri, og onkuntí› er viljin so sterkari enn likami›.

Regin vísir eisini á, at júst hetta er orsøkin til, at hann ikki hevur tiki› lut í so nógvum kappingum higartil í ár.

Sterkur bólkur

At Regin var fegin um, at ta› eydna›ist at vinna seg til finalubólkin royndi hann als ikki at dylja, tá vit tosa›u vi› hann:

– Nú eri eg so millum 10 teir sterkastu í heiminum, og ta› er naka›, sum fólk minnast, tá tosa› ver›ur um kappingina. Var› eg sligin út, hev›i ta› kunna gjørt ta› sama, um ta› var nær vi› ella ikki, tí ta› hava tey flestu gloymt eftir lítlari løtu, vóru or› hansara um hetta at røkka finalusessinum.

Gle›in mundi heldur ikki gerast minni av, at innlei›andi bólkurin, sum Regin var í, helst var tann sterkasti av øllum bólkunum. Ikki færri enn tríggir av teimum, sum vóru í bólkinum, rukku finaluni í fjør, men koritni eydna›ist ta› Regini at vinna seg fram um tveir av hesum.

Regin megna›i ikki at vinna seg fram til finalubólkin tá, hóast mótstø›an tá á pappírinum ikki var eins sterk. Millum mótstø›umenninar í bólkinum vóru somiki› sterk nøvn sum Tórfi Ólafsson, Rene Lindkvist, John Perry og so Glenn Ross, sum altso enda›i beint aftan fyri Regin.

Ivasamar vónir

Tá vit komu inn á, hvørjar vónirnar vóru til sjálva finaluna, var Regin eitt sindur ivasamur. Hann vísti á, at hetta í stóran mun er tengt at, hvussu ver›ur vi› ska›anum, sum hann nú fær vi›ger› fyri.

Talan er annars um sjey kappingargreinar í finaluni, og eru hesar:

Deadlift hold, har ta› ræ›ur um at halda reyvini á einum bili so leingi uppi sum gjørligt. Ta› skal leggjast afturat, at ta› var júst í hesi kappingargrein, at Regin fekk ska›an, og at ta› tískil er ivasamt, um hann luttekur í hesi.

Power-Stairs, har vekir upp á 200 kg skulu lyftast upp eftir nøkrum trapputrinum.

Ein flúgvari skal togast so skjótt sum gjørligt eftir einum ávísum strekki.

Farmers Walk, sum ikki er ein av sterku greinunum hjá Regini. Ta› er her teir skulu bera tveir strindur so langt sum gjørligt.

Atlas Stones. Sama kapping, sum tann seinasta í innlei›andi bólkunum, og sum er ein kapping, har Regin vanliga er sera sterkur.

Fingul Fingers, i› er greinin, har stóru pelarnir skulu koppast eftir enda.

Yoke Race. Her ver›a vektir á 350 kilo lyftar upp á akslarnar, og sí›ani skal rennast so skjótt sum gjørligt.

Regin vísir á, at hesa seinastu kappingargreinina hevur hann bert roynt einafer› á›ur. Ta› var, tá hann fyrstu fer› luttók í kappingini um at gerast heimsins sterkasti, og tá mundi hann nærum forkomi› sær. Regin datt nevnliga og mundi fingi› vektina á høvdi›, so her er øll orsøk til at vera varin. Regin sigur tó ví›ari, at trygdin í hesum er nógv betra sí›ani hetta, so sum so var ikki bangin fyri at luttaka í hesum.

Ta› kann leggjast afturat, at ta› má metast sum harmuligt, at eingin sonevnd »load event« er á skránni. Regin er nevnliga ein av teimum allarbestu í hesari grein, men vónandi kann heimsins sterkasti føroyingur tó røkka eini gó›ari endastø›u kortini.

Atlantsrisin er næstur

Hóast ta› kann tykjast møtumiki› at luttaka í slíkum kappingum, so fær Regin tó ikki nógva tí› at hvíla seg í.

2. september er aftur kapping á skránni, tá vit enn eina fer› sleppa at síggja, hvør skal fáa heiti› »Atlantic Gigant«.

Hetta er tri›ja ári› at kappingin ver›ur skipa›, og aftur í ár er talan um nakrar rættar risar, sum koma hendan vegin. Nakrir av luttakarunum eru teir somu, sum vóru vi› í fjør, og samanumtiki› tykist kappingin at ver›a har›ari í ár, enn hon var í fjør, ella sum Regin málber seg: – Hon er í øllum førum ikki veikari.

Hvussu Regin fer at standa seg til ta tí›, lata vit fyri fyrst standa ósvara›. Fyri fyrst ræ›ur um, hvussu fer at ganga seinna partin av hesi vikuni, tá heimsins sterkasti skal finnast.